


# Donsku kvinnurnar fara ikki í verkfall

Sjálvt um spælararnir á kvinnulandsliðnum eru í lønarsamráðingum við Danska Honndbólts Sambandið (DHF), so møta tey upp til felagsvenjing, 21. januar í Vejle. Teir raktu leikararnar hava annars umhugsað møguleikan fyri verkfalli, men tað fer ikki at ávirka samlingina í Vejle. - Rokni við at vit møta upp, Vit hava ikki avtalað verkfall, sigur Mette Sjøberg, ið er í einum bólki, sum skal samráðast við DHF.
- Tað er meningin, at vit, til komandi samling, skulu ígjøgnum kropsligar prøvar og debatera aktuellir trupuleikar á landsliðnum. Mette Sjøberg fastheldur samstundis, at landsliðsleikararnar enn eru áhugaðir í at finna eina loysn á stríðnum við DHF. Sambandið hevur ávarað við einari hálvering av lønini fyri at spæla á landsliðnum, meðan leikararnar ynskja at halda uppá gomlu avtaluna.

# Bert tímar til brakið móti Ísrael

**Landsdystarhýrurin skal bæði síggjast og hoyrast, á Hálsi í kvøld. –Finnur Hansson, stigtakarin metir at vit eiga at vera meiri vill og rópa og geyla meira**

HONDBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Niðurteljingin til triðja dystin hjá føroyska hondbóltslandsliðnum er byrjað, og klokkan 18 í kvøld er skipað fyri ”upphiting” í ítróttarhøllini á Hálsi, har fólk samlast og kunnu fáa andlitsmáling, men annars bara møtast og hugna sær og peppa hvønn annan upp til tann perfekta landsdystarhýrin.

### Hondbóltsfepur

Sannur hondbóltsfepur herjar oyggjarnar í hesum døgum, og ikki er tað serliga løgið heldur. Okkara manslandslið er í HM-Undankapping, har teir eru í bólki saman við krútsterka Serbia og tí, í hondbóltsheiminum, heldur minni kenda Ísrael. Hóast hesar tjóðir eru nógvar ferðir betur, og hava nógv fleiri altjóða royndir enn føroyingar, hevur føroyska liðið megnað at staðið risunum úr Serbia mát, í stórum pørtum av dystinum á heimavølli. Úrslitið gjørdist eisini bert fimm mál á muni 28-33.

Á útivølli í Serbia var talan tó um avsmurning, tá okkara ikki komu væl frá byrjan, og ein av profilunum hjá okkum, ikki var við, samstundis sum stjørnuskjúttarnar hjá Serbia høvdu ein framúr góðan dag.
- Slíkt kemur fyri á hesum støði, og tað skal man gera sær greitt, alt fyri eitt. Men tað er her tað er áhugavert og mennandi at vera við. Vit hava funnið rætta pallin, sigur júst umtalaði profilurin, ið kom inn á liðið til heimadystin. Talan er um sjálvsagt um Heina Hanusarsson, ið dagliga spælur í danska felagnum Elite 3000 Helsingør, har Rókur A. Nielsen eisini spælur.

### Venjarin hevur góðar vónir

Føroyski landsliðsvenjarin, Dia Midjord var, sum vera man sera fegin um innsatsin, føroysku leikararnar komu við, og metir at um sami innsatsur og sami vilji, dirvi og áræði verður at síggja í kvøld, er ikki óhugsandi at vit fara at vera vitni til enn eitt megnar úrslit, og kanska enntá okkurt stig eisini.
- Eg vil ikki lova ein sigur, men um vit standa eins væl, og vit gjørdu móti Serbia, og vit hava sama dirvið, áræðið og frekleikan, eiga vit at megna at koma við einum minst líka góðum úrsliti, sigur Dia Midjord eftir dystin á Hálsi, um vikuskiftið. Dia leggur afturat, at móti Ísrael eiga vit at megna at fylgja teimum líka til mállinjuna. So spennandi verður at síggja hvussu leikur fer fram í kvøld.
Vit ynskja føroyska liðnum og eisini Hondbóltsambandinum alt tað besta framyvir, og vónandi verður ungdómurin eisini at síggja í altjóða kappingum, eins væl og kvinnurnar. Hetta fremur menning og góðsku, og eigur at vera vegurin. Góðan dyst og góða byr framyvir.



*Dia Midjord roynir sínar taktisku snildir. Vónandi rakar hann rætt í kvøld, tá Ísrael koma á vitjan.*

# Grant vónar enn at fáa Anelka til Chelsea

**Avram Grant, venjari hjá Chelsea vónar, at keypið av Nicolas Anelka er avgreitt til komandi vikuskiftið.**

Bolton hevur avvíst eitt tilboð frá Chelsea uppá Nicolas Anelka, sum ljóðar uppá 12 miljónir pund. Avram Grant vil heldur enn gjarna ogna sær tann 28 ára gamla fraklendingin. ”Vit vildu hava hann tøkan mánadagin, men vóna at hava hann tøkan til leygardagin!” segði Avram Grant aftaná 2-1 sigurin hjá Chelsea í Ligasteypakappingini, ígjár. ”Vit mangla tríggjar áleyparar, so tað er av stórum týdningi, at vit fáa ein áleypara, her og nú!” leggur Grant aftrat. Didier Drogba og Salomon Kalou er báðir farnir av landinum fyri at kunna luttaka í afrikanska meistaraskapinum. Hinir báðir áleyparnir, Andrey Shevchenko og Claudio Pizzaro hava samanlagt bert skorað fimm mál í Premier League, í ár. Nicolas Anelka hevur skorað 11 mál fyri Bolton í hesum kappingarárinum. Hann undirskrivaði ein 5-ára sáttmála við Bolton í august, í fjør. Men nú røkist nógv fyri, at Anelka gerst partur av hópinum hjá Chelsea.

**hs.**

# Everton misti á stokkinum

**Everton hevði ein 1-1 javnleik í fyrru hálvfinaluni, men mistu alt á gólvið.**

Fyrra hálvfinalan ímillum Chelsea og Everton í Ligasteypakappingini var á Stamford Bridge í kvøld. Shaun Wright-Phillips legði Chelsea á odda eftir 26 minuttir. Yakubu javnaði fyri Everton í 64. minutti, men í yvirtíðini skoraði Shaun Wright-Phillips við einum stútara aftur fyri Chelsea, so teir vunnu 2-1. Chelsea-leikarin, John Obi Mikel fekk beinleiðis reytt kort fyri eina grova takkling ímóti Phil Neville. Seinna hálvfinalan verður á Goodison Park, mikukvøldið 23. januar. Í morgin leika Arsenal og Tottenham fyrru hálvfinaluna sína millum. Hesin fyrri dysturin verður leiktur á Emirates Stadium.

**hs.**




*Everton var nær við á Stamford Bridge, men mistu á stokkinum. Men 23. januar hava teir møguleikan aftur á heimavølli*